# Føroyatúrur skelkaði Sebastian


*Onkuntíð havi eg havt trupulleikar við røddini, men tað havi eg ikki longur, so samanumtikið er tað ivaleyst rætt, tá ummælararnir skriva, at Sebastian er betri enn nakrantíð*

Ein buldrasligur flogtúrur til Føroyar í 1977 var orsøk til, at Sebastian í 10 ár ikki setti fótin í eitt flogfar. Men nú er flogræðslan burturi, og Sebastian hevur vitjað Føroyar fleiri ferðir seinastu mánaðarnar. Mikudagin 8. mars kemur hann aftur til Føroyar.

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Mikudagin 8. mars fer fólkakæri danski troubadururin Sebastian á pallin í Norðurlandahúsinum. Hetta er partur av hansara comeback konsertferð sum einstaklingur. Hann sigur seg gleða seg til at sleppa aftur til vøkru føroysku náttúruna og vinarliga og fitta fólki, ið her býr. Men tað er eingin sjálvfylgja, at konsertferðin eisini leggur inn í Føroyum. Í árunum 1977-87 var Sebastian so ringur av flogræðslu, at hann ikki fór í eitt flogfar. Ræðslan stóðst av einum sera buldrasligum flogtúri úr Keypmannahavn í Vágarnar.

### Betur ógjørt

“Flogferðslan hevði ligið lamin í tríggjar dagar orsakað av kavaódn”, greiður Sebastian frá, meðan hann skiftir streingir á kassagittaranum. Vit eru í óvanliga stóra rúminum handan pallin í spælistaðnum Støberihallen í Hillerød. “Fjórða dagin royndu vit so, men tað var betur ógjørt. Túrurin var so ótespiligur, at eg ikki vildi flúgva í 10 ár eftir, at eg var komin til hús aftur. “.

Men flogræðslan er burtur, eisini ræðslan fyri at flúgva til Føroyar. Sebastian var í Føroyum fleiri ferðir í sambandi við uppsetingina av Ronju Ránsmannadóttir, og nú kemur hann aftur. Hann sigur, at tað er eingin ivi um, at tætta sambandið við Niels Halm í Norðurlandahúsinum er beinleiðis orsøkin til bæði uppsetingina av Ronju og konsertina 8. mars. Men samstundis dámar honum væl í Føroyum. Náttúran er stórsligin, og fólki er sera vinarligt, “Í øllum førum tey, ið eg havi hitt higartil.

### Enn ein útseld konsert

Vit sita aftan fyri pallin og drekka kaffi, saman við ljóðmanninum og onkrum hjálparfólki. Sebastian vil fegin gera seg lidnan við at seta streingir á gittarin, áðrenn vit fara okkurt friðarligari stað at práta. Stemningurin tykist sera góður. Menn tykjast eitt sindur spentir, men tó avslappaðir. Konsertin í kvøld er útseld, tað eru tær altíð hjá Sebastian.

42 útseldar konsertir vóru fyrsti parturin av konsertferðini, síðan helt Sebastian ein steðg vegna sjúku, men er júst farin undir aftur konsertferðina. Hann greiðir frá, at sjúkan fór illa við honum, men samstundis helt hann uppat við at roykja, tí gongur lættari at syngja enn áður. “Onkuntíð havi eg havt trupulleikar við røddini, men tað havi eg ikki longur, so samanumtikið er tað ivaleyst rætt, tá ummælararnir skriva, at Sebastian er betur enn nakrantíð.”

Vit fara út í tóma konsertsalin, seta okkum á fremsta rað. Um eina løtu verur salurin fullur. Men hesa løtuna eiga lesararnir í Sosialinum ein tann besta danska trubadurin gjøgnum tíðirnar, til eina samrøðu, um tónleikin, yrkisleiðina og konsertferðina.

### Konsentrerar seg um seg

Eftir, at Sebastian í 10 ár ikki hevði verið á palli sum einstaklingur, fór hann í 2003 á konsertferð. Hann greiðir frá, at orsøkin til, at hann fór á pallin aftur sum einstaklingur, var tí, at hann hevði tíð til tað. Sebastian spældi fyrstu árini av síni yrkisleið rættiliga nógv sum einstaklingur og rættiliga nógv við bólki. Í 80’árunum gjørdist sjónleikurin og sangleikurin ein alt størri partur av hansara lívi. Tí gavst hann við at ferðast við bólki í 1987. Men helt fram sum einstaklingur til 1993 ella 1994. Tá var heldur ikki tíð til hetta. Hann fór frá at skriva sangleikir, til at leikstjórna og seta teir upp sjálvur. Alt ov ofta vóru uppsetingarnar av hansara leikum stutt sagt ov vánaligar. Tí vildi hann sjálvur royna at gera tað betur. “Eg hevði skrivað nakrar av best dámdu donsku songleikunum, men tíanverri vóru framførslurnar oftað als ikki nøktandi. Tí var týdningarmikið fyri meg, at sjálvur sleppa at leikstjórna leikirnar. Soleiðis kundi eg tryggja mær, at leikurin minst einaferð varð settur upp nøktandi. Nú eru allir leikirnir framførdir nøktandi. Eg havi sjálvur leikstjórnað teir flestu leikirnar, ið eg havi skrivað. Tí kundi eg aftur fara á konsertferð og konsentrera meg um meg.”, sigur Sebastian.

### Einki gjørt í nógv ár

Hann heldur, tað vera áhugavert, at tá hann var á ferðum sínum í Føroyum í heyst og í vetur, varð hann fleiri ferðir spurdur, um hví hann einki hevði gjørt hesi árini. Hann fekk varhugan av, at nógvir føroyingar einki kendu til allar leikirnar, ið hann hevði skrivað, og allar fløgurnar við sangleikstónleiki, ið hann hevði gjørt hesi árini. Men hann kann troysta tey, ið bíða eftir eini Sebastian fløgu, at ein tílík kemur. Hann hevur góðan hug til at skriva til sín sjálvs nú og væntar, at hann gevur eina fløgu út um 1 ella 2 ár.

### Bert í SvF

Seinastu 30 árini hevur Sebastian givið út fleiri enn 30 útgávur, so lagaskatturin er stórur, millum nútímans klassikararnar eru løg sum Når lyset bryder frem, Rose, Vårvise, Du er ikke alene, Romeo, Måske ku’ vi, Sangen om Langfart, Sørøver Jenny, Ostesangen, Sommerfuglen og Den lille malkeko, Hodja fra Pjotr og sjálvandi tónleikurin úr Ronju Ránsmannadóttir. Hann hevur framført yvir túsund konsertir sum einstaklingur. Men tað er bert ein sjónvarpsstøð í heiminum, ið hevur tikið eina konsert við Sebastian upp. Tað er Sjónvarp Føroya, ið tók konsertina hjá Sebastian í Norðurlandahúsinum fyrst í 90’árunum upp, greiðir hann frá. “Tað var ikki fyrr enn, eg sjálvur skipaði fyri upptøkum av eini konsert í Odense og gav hana út á DVD, at danski hyggjarin fekk møguleikan at uppliva meg á skíggjanum”. Hetta, at fólk ikki hava sæð einstaklingakonsertirnar uttan so, at tey hava verið á konsert, ger, at tá tey fyrstu ferð koma á konsert, gerast tey eitt sindur tikin av bóli av, at t.d. humour spælir ein so stóran leiklut í framførsluni.

### Konsertin skal vera ein heild

Sebastian sigur, at hann altíð eins og í sangleikunum og fløgum, roynir at gera konsertirnar til eina heild. Hann ger sær stóran ómak við at byggja skránna upp á rættan hátt. Aftan á eitt ávíst slag av lagið, skal eitt annað slag av lagi koma. Hetta er eitt putlispæl, ið gerst til eina eind. Hetta hava nógvu royndirnar sjálvandi gjørt munandi lættari.

Ein plátufelagsstjóri segði